DAGSINS MEINING

Granskingarhugsjón

Leygardagin hevði Granskingarráðið kunnandi lýsing í bløðunum. Í lýsingini verður hugsjónin hjá Granskingarráðnum lýst út í æsir. Hetta er sera áhugaverdur lesnaður, tí hann vísir, hvørji øki, ið Granskingarráðið fer at leggja mesta dentin á framyvir. Granskingarráðið leggur dent á, at størri ágóði av tilfeinginum fæst við einum framkygdum og málrættaðaum granskingarpolitikki. Í hesum sambandi hevur ráðið greinað innihaldið í føroyskari gransking, menning og nýskapan. Ráðið hevur býtt føroyska gransking upp í seks høvuðspartar við ítøkiligum undirevnum.

Evnini, sum Granskingarráðið hevur tikið fram eru matvøruvinna sum ein marknaðartillagað, umhvørvisvinarlig og lønandi vinna. Annað evnið er mentan, ið verður lýst sum fortreyt fyri tilvitandi samfelagsmenning. Onnur evni eru vitan sum fortreyt fyri demokratiskari menning, náttúran sum prýði og støði undir vinnuligum virksemi, fólkaheilsa og nýskipan.

Granskingarráðið er rættiliga nýggjur stovnur við egnum stýri og egnari figgjarætlan. Tað tykist, sum hugsanin er, at hesin stovnur skal virka óheftur av politiska valdinum. Hetta er avgjørt neyðugt, tí granskingin eigur at vera fræls og óheft. Hinvegin verða ráðslimirnar valdir politiskt, so tað kann vera torført at síggja, hvussu politiskt óheftir hesir limir í roynd og veru eru. Hetta er nakað, sum bert má standa sína roynd. Tá hetta er sagt, má viðurkennast, at gransking er eitt sera týðandi øki í nútíðarsamfelagnum og eigur sostatt at verða bakkað upp av øllum politiskum flokkum.

Tað er bæði rætt og neyðugt at raðfesta, og flestøll munnu ivaleyst ásannað, at raðfestingarnar hjá Granskingarráðnum eru týdningarmiklar, áhugaverdar og viðkomandi. Flestøll munnu eisini ásanna, at tað er í tøkum tíma, at samfelagið satsar uppá gransking. Granskingarráðið eigur rós uppiborið fyri sítt útspæl. So fáa vit at síggja, um politikkararnir hava viljan at útvega tann neyðuga peningin, ið ivaleyst skal til fyri at hugsjón Granskingarráðsins skal kunna setast í verk.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Eitt valdømi - einaferð enn

Jákup Sverri Kass,
sjálvstýrismaður

Hevði fyri stuttum eina grein í bløðunum har eg gav til kennar, at eg meini, at Føroyar eiga at gerast eitt valdømi. Greinin hjá mær og viðmerkingar til greinina frá tíðindamanninum, Pól á Kletti, hava fingið Jógvan við Keldu, løgtingsmann uppá afturbeinini.

Í grein síni setir Jógvan fram eina rød av spurningum, sum hann biður Pól á Kletti og undirritaða um at svara uppá. Eg fari ikki at fylgja hesi áheitan slaviskt, men vil nýta høvi til enn einaferð at grundgeva fyri míni áskoðan.

Jógvan vísir á, at Grønland møguliga er einasta dømi uppá eitt land, sum bert hevur eitt valdømi. Eg vil loyva mær at sláa fast, at broytingin hevur verið góð fyri grønlendingar. Grønlendingar hava fingið landspolitikarar, og í grønlendska Landstinginum er í dag umboðan frá øllum landinum.

Men í veruleikanum noyðast vit føroyingar ikki altíð at samanbera okkum við onnur. Spurningurin er, hví vit í útnorði aldri kunnu verða undangongumenn - hví skullu vit altíð verða eftirbátar? Í Føroyum búgva hóast alt ikki meira enn 48.000 sálir - tað sama sum í Vejle ella Horsens. Vit tosa um, at Føroyar og føroyingar eru ein serstøk tjóð. So lat okkum finna okkara egnu loysnir, til tess at skapa okkara egna framburð - vit hava brúk fyri nýhugsan.

Jógvan spyr, hvør munurin er á lokalpolitikarum í Havn og í Klaksvík. Tað er ongin munur á lokalpolitikarum í Havn og Klaksvík. Trupulleikin hesum viðvíkjandi er, at teir ikki skullu standa til svars fyri øllum borgarum - bert teimum í sínum egna valdømi. Endamálið við nýggju skipanini skal vera at avskaffa lokalpolitikaran og skapa eitt grundarlag fyri landspolitikarum í landspolikki.

Hví skullu vit ikki kunna skipa okkum sum eitt land, har politikarin til eina og hvørja tíð skal standa til svars fyri øllum borgarum landsins? Eg ynski, at føroyingar skullu fáa møguleikan at stemma fyri øllum valevnum - ikki bert teimum í nærumhvørvinum. Tað kann ikki vera rætt at nakrir fáir kilometrar skullu avgera, at ein ikki fær møguleikan at stemma fyri vælegnaðum valevni frá grannabygdini. Ein skal kunna stemma uppá besta løgtingsvalevni; óansæð hvar í landinum valevni kemur frá!

Jógvan spyr eftir trygdini hjá borgarinum fyri at Landssjúkrahúsið og almenna fyrisitingin gerst bíligari, um so er at vit fáa eitt valdømi. Eg skal lova tær fyri, at tað gerst ikki bíligari við at petta tað sundur og flyta tað á bygd.

Ein annar stórur trupulleiki, sum Jógvan slett ikki vil koma inn á er, at núverandi løgtingsvallóg er ótíðarhóskandi. Nýggja kommunulógin og kommunusamanleggingar gera, at vit í nærmastu framtíð verða noydd til at broyta valdømisbygnaðin.

Hattin av fyri teimum bygdaráðsformonnum, sum hava sæð at framburður og menning er í felagsskapi. Størri eindir skapa eitt umhvørvi har ein vælvirkandi umsiting kann fáast uppá beinini. Umframt at geva arbeiðspláss til tey við drúgvari útbúgving, vil hetta skapa eina sterkari miðfyrisiting á nærplássunum.

Vit mugu síggja í eyguni at til tess at skapa framburð og menning, so eru vit noydd til at fáa politikarar á landspolitiska leikpallin, sum síggja longur enn til næsta bøgarðin. Skullu vit skapað framhaldandi gróðrarlíkindir fyri land og fólk, so er eyðsæð at lógir og mynduleikar einas at standa saman um at menna hesar karmar.

Ein klókur maður segði einaferð: »Prísurin fyri at gera tað góða gamla er nógv hægri enn prísurin fyri broyting og nýhugsan«.

Sjúklingar kunnu trygt koma á deildina

Óluva Hentze
deildarleiðari,
landssjúkrahúsið

Viðmerkingar til sending í Útvarpi Føroya týsdagin 17.06.03., har tosað varð við mann, ið hevur verið fyri tí vanlagnu at gerast avlamin á alt ov ungum aldri.

Hóast hendingin fór fram fyri mongum árum síðani 1987 og 1995, varð sendingin kallað ***Føroyar í dag***.

Í sendingini greiddi maðurin frá, at hann á Landssjúkrahúsinum varð fluttur á deild, har øll vóru í ørviti. Her má eg gera vart við, at tað á deildini fyri endur-uppvenjing sjáldan eru fólk, sum eru í ørviti, og um so er, so er tað orsakað av tí heilaskaða, tey hava fingið. Nakað annað er við røktardeildini, har kemur tað fyri at fólk eru í ørviti.

Vónandi vita fólk flest tað, sum journalisturin ikki veit, ella vil vita, at røktardeildin á Landssjúkrahúsinum ikki er tað sama sum enduruppvenjingardeildin.

Deildarleiðarin var fyri grovum ákærum. Í hesum sambandi vil eg vísa á, at vit á deildini hava hóg etisk viðið og vildu aldrin farið so langt, sum at komið við slíkum úttalilsum ella, sum tað varð framlagt, hóttanum.

Tað harmar meg, at maður, sum tá hevði sítt heim á røktardeildini og var vælkomin har, varð nevndur, við bygdanavni – var tað neyðugt?

Eg vil gera vart við, at eg – undirritaða – ikki var deildarleiðari tá tíðina, maðurin var innlagdur, eg var tá í farloyvi og búsitandi í Danmark.

At enda vil eg siga, at sjúklingar trygt kunnu koma á deildina, eingin verður hóttur við nøkrum sum helst.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Ummæli av ráðstevnu 13. juni 2003 um kvinnur sum leiðarar

Annika W. Joensen
17. juni 2003

»Tú kann, um tú vil« - og dog...

Hetta er boðskapurin, sum stendur eftir á mínum innara skermi, nú ráðstevnan um kvinnur sum leiðarar er av. Hetta eru góð ráð og ivaleyst lykilin til leiðarakarrieruna hjá flestøllum fólkum. Men tað er ikki allur sannleikin. Aftur at viljanum, er neyðugt við serligum tiltøkum til tess at fáa fleiri kvinnuligar leiðarar. Ein av fortreytunum er, at teir menn og tær kvinnur, sum hava vald at seta fleiri kvinnuligar leiðarar, gera tað. Og at tey góðtaka nýggjar leiðslunormar, nevniliga tær, sum kvinnur kunnu skapa.

Á ráðstevnuni viðgjørdu føroysku leiðararnir, donsku gestirnir og stjórin á Føroya Tele støðuna og lívið hjá kvinnum. Donsku gestirnir vóru trekkplástur, men gullkornini komu frá føroysku kvinnunum, sum erliga - og uttan at balla ov nógv inn í ull - greiddu frá sínum royndum og hugsanum um lívið sum menniskja, karrierukvinna, mamma, kona, vinkona og húsholderska. Tilsamans fingu vit eina fjølbroytta mynd av trupulleikum, møguleikum, ynskjum og viljanum at liva uppá egin præmissir.

Flestu okkara vóru spent at hoyra Pernille Aalund og vit vóru ikki vónsvikin. Pernille Aalund er ein framúrskarandi fyrilestrarhaldari, sum megnar at fylla ein pall og førir sín boðskap fram á ein lættan, skemtingarsaman og professionellan hátt. Hon tekur støði í einstøku kvinnuna og greiðir frá, hvussu vit hvør í sær sjálvi kunnu finna lukkuna.

Pernille Aalund er sannførandi, men kortini haldi eg, at hon teknar eina ljósari mynd enn realistiskt er. Granskingarúrslit hava prógvað, at javnstøða ella persónligt frælsi ikki bert kemur, um tú sum einstaklingur ynskir tað nóg nógv. Tað er ivaleyst rætt, at lukka (vælvera, nøgdsemi ella hvat vit skulu kalla tað) byrjar og endar við einstaklinginum, men samfel-agsbygnaður og siðvenja ávirka eisini støðuna millum kynini. Tí skal í summum førum meiri til enn vit sjálvi sum einstaklingar megna.

Næst á pallinum var Laufey Blásvær. Hon arbeiðir sum sjálvstøðug vinnurekandi, og greiddi m.a. frá, hvussu tað er at arbeiða heimanífrá og hvussu nógv arbeiðið hevur at týða í hennara lívi. Fyri at kunna arbeiða nógv, hevur verið neyðugt at tora at lata støv vera støv, og at ásanna, at tað eru hendingar, sum fara fram við borðinum. Um avbjóðingina at sameina arbeiði, graviditet og føðslar segði Laufey, at tað er neyðugt at lurta eftir kroppi sínum og 'geara niður', tá kroppurin sigur frá. Hetta kann vera trupult, serliga kanska tá ein er sjálvstøðug og tímir væl. Laufey hevur gáað eftir, at hennara sjálvsmynd als ikki svarar til ta mynd onnur hava av henni. Og at hetta til tíðir kann ørkymla. Hon nevndi m.a. hugtakið »karrierukvinna«, sum hon ikki heldur passar til sín, men sum er ein básur, onnur koyra hana í.

Sólja í Ólavstovu, aðalstjórin í Almannamálum, hevur drúgvar royndir sum leiðari á ovastu almennu rókunum í Grønlandi og Føroyum. Við sínum blíða, róliga lyndi greiddi hon frá, at kvinnur eiga at taka av arbeiðsligu avbjóðingunum og ikki lata seg avskrekka og takka nei til leiðarastørv, um tær hava børn. Og forrestin ikki sita og bíða til tilboðið kemur, men sjálvar bjóða seg fram. Børn er ongin forðing. Tað hjálpur, um tit eru tvey, og um pør hjálpast við børnum og húsarhaldi. Men sum Laufey, hevur Sólja valt at raðfesta. Hon hevur valt heimabakað breyð, stívaðar gardinur og lavendelduftandi seingjarklæði, sum sveiggja í vindinum uttanfyri dustfría húsið, frá.

Andras Róin, stjóri á Føroya Tele, var einur steggi millum bøgur. Hann legði fyri við at greiða frá einari hending dagin fyri, har hann segði dóttir sínari, at hann skuldi halda framløgu fyri 130 fólkum, sum ikki høvdu slips. Um hon kundi gita, hvørji fólkini vóru? Hon gitti 'børn' og 'felagið móti nýtslu av slipsi' og 'øgiliga fátøk fólk'. Tað kom henni ikki til hugs, at tað kundi verið kvinnur, sum skuldu hoyra framløguna. Kanska spurningurin var misleiðandi, kanska ikki. Tankavert er tað í øllum førum.

Umframt at lýsa kynjabýtið millum leiðarar á Føroya Tele (sum ikki er javnt - ongin kvinna er í ovastu leiðsluni) og arbeiðið at fáa fleiri kvinnuligar leiðarar í fyritøkuni, snúði framløgan seg um arbeiðið hjá altjóða telesamskiftisfelagnum at javna kynjabýtið á leiðarastigi og generelt. Í stuttum er høvuðsboðskapurin, at kvinnur mugu handla proaktivt, tvs sjálvar søkja størv og gera nakað fyri at fáa ávirkan, og mennirnir mugu lata hurðina upp, so tær sleppa til valdið og pengarnar.

Fyritøkur, sum ikki hava eitt javnt kynjabýtið á ovastu rók, missa inntøku. Tað er fakta. Hetta veit stjórin á Føroya Tele. Hetta vita tey eisini í Íslandi, Danmark og øðrum londum. Nær almenna umsitingin, mongu privatu nevndirnar og aðrir stjórar fylgja tropp, verður spennandi at síggja. Takið eisini tit av møguleikunum og avbjóðingunum.

Marita Rasmussen, hevur starvast mong ár í fiski- og alivinnuni. Hennara royndir eru, at menn eru góðir starvsfelagar (hóast málburðurin til tíðir kann vera í so 'stuttligur'). Vit seta stór krøv til okkum sjálvar, og hava onkuntið ilt við at góðtaka valini hjá hvør aðrari. Hennara boð uppá, hvussu fleiri kvinnur kunnu gerast leiðari er, at vit taka av møguleikunum, góðtaka okkara val og stuðla hvør aðrari í teimum. Ikki at spyrja til okkara ringu samvitsku og skuldarkenslur sum mammur, konur og húsholdersker, men heldur at dyrka spennandi uppgávurnar og góðu úrslitini. Ein kvinna stendur sterk, um hon hevur stuðul frá manninum/makanum og hevur eitt gott netverk í vinkonum og arbeiðsfeløgum. Tað eru so nógvar fyrimunir við at vera leiðari, at fleiri áttu at roynt tað. Tú kann sjálv leggja tíðina hjá tær til rættis, tú fær fleiri pengar og tú fær spennandi uppgávur, segði Marita.

Í sínari framløgu greiddi Turið Debes Hentze frá sínum arbeiðsroyndum, sum bera merki av, at hon er kvinna. Tað er nevniliga munur á uppgávunum hjá mannligum og kvinnuligum advokatum. Í høvuðsheitum hava kvinnurnar familjumál, sum ikki kasta so nógv av sær og mennirnir vinnumál, sum kasta av sær. Við sínum drúgvu royndum sum forkvinna í Javnstøðunevndini og ein av stigtakarunum til Kvinnuhúsið, er Turið ikki 'hvem som helst'. Hon er beinrakin, erlig og djørv, og vísti í framløguni á, at tær flestu kvinnurnar fáa áhuga fyri javnstøðumálum, tá tær sjálvar eru fyri mismuni. T.d. tá tær fáa børn. Hon legði doyðin á, at tað er neyðugt at arbeiða miðvíst við at fremja javnstøðu millum kynini og at kvinnur sjálvar mugu vera við í hesum arbeiði.

Joan Peitersen, samskiftisráðgevi, var gott supplement til Pernille Aalund, tí hennara leiklutur var at vísa okkum, hvussu vit í praksis kunnu uppnáa tað, sum Pernille Aalund snakkaði um. Nevniliga tað lív, sum vit ynskja okkum og sum ger okkum lukkulig. Eisini hennara boðskapur tóktist í so ljósareyður, men tað er onki at ivast í, at amboðini, sum hon gav okkum eru hent og kunnu vera medvirkandi til, at persónligi hugburðurin broytist. Og tá ber nógv til.

Ráðstevnan var eitt flott tiltak: skráin var góð og fjølbroytt, alt var væl fyriskipað og sjálv ráðstevnan var stýrd við róligari, kønari hond. So rós eiga fyriskiparin Ása Andreasen og orðstýrarin Bjørt Samuelsen uppiborið. Eg má her taka fram, at tíðarætlanin fyri dagin helt, og tað er jú nærum slóðbrótandi her á leiðum.

Á ráðstevnuni vóru luttakararnir tiknir við inn í møguleikans land. Nú er upp til okkum at breiða boðskapin, taka røðararnar uppá orðið og taka av møguleikunum, sum koma. Eg vóni, at fleiri slíkar ráðstevnur verða fyriskipaðar - ikki bert fyri kvinnuligum leiðarum, men fyri kvinnum og monnum sum heild, tí í dag er tað bara so, at tey flestu hava trupult við at fáa gerandisdagin at hanga saman.

Eg vil at enda vegna Javnstøðunevndina takka Føroya Tele fyri at hava skipað fyri ráðstevnuni, og harvið virka fyri almennari umrøðu av kvinnum sum leiðarar. Hetta hevur týðning, tí rollumodel eru sera umráðandi, tá um persónligar og samfelagsligar broytingar ræður.

Fakta

Ráðstevnan var hildin 13. juni 2003 á Gamla Meirarínum í Havn og varð fyriskipað av Føroya Tele. Bjørt Samuelsen, tíðindakvinna, var orðstýrari.

Røðarir vóru Pernille Aalund, produsari, sjónvarpsvertur, rithøvundur v.m.
Laufey Blásvær, sjálvstøðug vinnurekandi innan KT
Sólja í Ólavsstovu, aðalstjóri í Almannamálaráðnum
Andras Róin, stjóri á Føroya Tele
Marita Rasmussen, fulltrúi í Fiskimálaráðnum
Joan Peitersen, ráðgevi innan samskifti
Turið Debes Hentze, advokatur

Umleið 130 luttakarir vóru, harav 4 menn. Tá 70 stóðu á bíðilista, varð listin stongdur. So onki er at ivast í, at tørvurin og áhugin fyri slíkum ráðstevnum er stórur.

Viðgerð av Persónsupplýsningum

Kaj Leo Johannesen
Løgtingslimur

Undirritaði fær sum tingmaður sendandi kunngerðabløð við postinum um ymiskar kunngerðir sum eru settar í gildi í Føroyum, nú ein av døgunum kom kunngerð við postinum, sum bannar ávísari vinnugrein við afturvirkandi kraft at útflyta persónligar upplýsningar, sjálvt um áðurnevnda vinnugrein hevur og hevði øll neyðug loyvi frá Dátaeftirlitinum, hesa kunngerð skilir undirritaði ikki, og skal tað verða meira enn løgið, um ikki ein rættarsak kemur undan kavi mótvegis Løgmálaráðnum um endurgjald.

Landstýrismaðurin í lógarmálum hevur enn ikki greitt Løgtinginum frá hvat munurin er útfrá tulkingini hjá Løgmálaráðnum á vanligum persónsupplýsningum ella data, og viðkvomum upplýsningum.

Upprunastøðið er, at lógin skal tryggja/regulera persónsvernd hins einstaka, tá persónsupplýsingar verða viðgjørdar. Síðvenja er, at skilt verður millum ymisk hugtøk:

- Viðkvom dáta og vanlig dáta
- Trygg lond og ótrygg lond

Við viðkvom dáta skilst, átrúnaður, politiskur litur, kynslív, lógarmisbrot v.m., meðan vanlig dáta hava eitt heilt annað sermerki.

Vanlig dáta bera merki av, at tað eru upplýsingar ið hvør einkultur, tað verið seg persónur, virki ella land, kann gera nýtslu av dagliga. T.d. telefonnummar, bústaðarupplýsingar v.m., herundir eisini sendari og móttakari av peningaupphæddum, ið krevst, skal ein daglig gjaldsmiðling fara fram.

Tað er í mínum hugaheimi eingin fyritøka sum kann verða til í dag uttan at "viðgerða persónsupplýsningar" hettar er nokk serliga galdandi innan figgjarsektorin og tryggingarsektorin, men sjálvandi eisini innan aðrar vinnir sum hava tørv at flyta upplýsningar millum lond, men aðrastaðni verður í stóran mun skilt í millum ótrygg lond og trygg lond.

Danmark er eitt trygt land og ES er eitt trygt øki, Føroyar er uttan iva ikki nóg trygt tá talan er um EDV trygd hjá almennum stovnum, tað kann lesast í ársfrágreiðing hjá Landsgrannskoðarnum, hvar niðurstøðan er at trygdin ikki er nøktandi.

Mín spurningur
Kundi Løgmálaráðið ella landstýrismaðurin í lógarmálum greitt okkum frá við einum verðuligum dømi hvussu tulkingin av, ella hvat tað er, sum øll bankavinnan og tryggingarfeløgini, og so at siga allir tinglimir ikki hava skilt higartil, tá talan er um »Vernd av persónsupplýsningum« her verður hugsað um

- Viðkvom dáta og vanlig dáta
- Trygg lond og ótrygg lond.